# Discipliner upplæring



**Sámal Petur í Grund**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*

Við tí samfelagsmynstri sum vit hava í dag, hvar bæði maður og kona eru á arbeiðsmarknaðinum og skúlin er frátikin møguleikan fyri uppdragilsi, er tørvur á eini disciplinerari upplæring.

Londini rundanum okkum hava militær, sum deilvíst er fíggjað við eini skyldu til at tæna samfelagnum í eitt ávíst tíðarskeið, tann sokallaða værnapligtin.

Vit hava ikki militær og skulu heldur ikki hava tað, men vit eiga at hava eina disciplinæra upplæring á ein ella annan hátt.

Bæði hvat viðvíkjur tí at kenna skyldur sínar mótvegis samfelagnum, sínum medborgarum og tað at møta stundisliga átti at ligið í eini tílikari upplæring.

Allir borgarar landsins áttu at farið ígjøgnum eina tílíka upplæring í sínum ungdómsárum og komið styrkt út í mandómsárini.

Samstundis kundi hendan tænastan fíggjað eina ella aðra almenna uppgávu.

Hetta eigur at vera gjørt, áðrenn alt fer heilt útav sporinum.

Hetta er eitt av hjartamálum mínum.

X við lista D.

# Vit halda kósina



**Jógvan Arge**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*

Týsdagin skalt tú avgera, hvørja leið Føroyar skula halda næstu fýra árini.

Skula vit halda kósina fram móti einum sjálvstýrandi og sjálvberandi Føroyum, ella skula vit detta aftur í eitt høvuðsleyst heimastýri, har føroyska samfelagsskútan rekur fyri vág og vind?

Í okkara hjørtum er ongin ivi. Sjálvandi skal kósin haldast.

Heimastýrisflokkarnir hava avdúkað, at teir ætla at rista breiðar álir av landskassanum, og útlit eru til, at við teimum við róðrið enda vit aftur í heimastýrissugguni, sum vit hava so ringar royndir av.

Tjóðveldisflokkurin stevnir fram móti einum sjálvberandi og sjálvstøðugum Føroyum, har pláss verður fyri øllum.

Tjóðveldisflokkurin leggur dent á greiðan skilnað millum alment og privat.

Politiska skipanin skal taka sær av vælferð og trivnað fólksins og hitt privata fyritakssemið av vinnulívinum, sum er grundarlagið undir vælferðini.

Tjóðveldisfloksins høvuðsmál eru sjálvstýriskósin, sosial frambrot, frælst vinnulív, føst búskaparstýring og mentanarlig menning.

Vit vilja nøkta tørvin á ellis- og røktarheimsplássum. Vit vilja gera nýggja pensjónsskipan, byggja barsilsskipanina út og menna heilsuverkið.

Vit vilja skapa vinnuni góðar karmar og gera upp við tær donsku kreppuloysnirnar.

Vit vilja stýra búskapinum við fastari hond, tí sjálvræði krevur búskaparliga ábyrgd.

Rættarskipan, løgregla og fólkakirkja eru klár at yvirtaka, og grundlógin er undir borði.

Hvør einasta atkvøða fyri Tjóðveldisflokkurin verður brúkt í stríðnum fyri at yvirtøkurnar verða framdar og grundlógin sett í verk.

Sjálvstýriskreftir standa tí saman um Tjóðveldisflokkin. Tá verður atkvøðan við vissu nýtt til frama fyri føroyskt sjálvræði, og tá er ongin vandi fyri at heimastýrið vinnur á sjálvstýrinum.

Løgtingsvalið er eitt val millum fortíð og framtíð. Tí er tað ikki torført.

Veljið framtíðina og Tjóðveldisflokkin týsdagin.

# Útjaðarin sterkur - Føroyar sterkar

**Jaspur Vang**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Fiskivinnan er høvuðsvinna okkara og tí grundarlagið undir vælferðarsamfelagnum Føroyar. Skulu vit menna land okkara, mugu vit landspolitiskt menna fiskivinnuna og styrkja tey øki í landinum, har fiskivinnan er, eins og tað er neyðugt at betra umstøðurnar hjá teimum, sum virka í vinnuni.

**Samfelagsgongdin**

Tað, at fólk flyta millum ymisku økini í landinum, vísir í stóran mun búskaparligu gongdini í hesum økjum í mun til hvørt annað.

Vit vita øll, at seinastu mongu árini er mestsum øll almenn fyrisiting og umsiting miðsavnað. Á henda hátt verður tryggjað ávísum økjum í landinum eitt stórt útboð av fjølbroyttum og støðugum arbeiðsplássum, sum taka til sín vælútbúnu arbeiðsmegina, og harvið ríka og menna viðkomandi øki við sáttmálabundnum, lutfallsliga høgum og støðugum meðalinntøkum.

Á henda hátt miðsavnast arbeiðsplássini, fólkið og tænastu- og handilsvinnan. Við verandi valskipan miðsavnast soleiðis eisini politiska -, fyrisitingarliga, umsitingarliga og fíggjarliga valdið í landinum í alt størri mun. Soleiðis tykist ringrásin halda áfram, alt meðan tey øki í landinum, har meginparturin av høvuðsvinna okkara er, fánar burtur.

**Trupulleikin**

Øll vita vit eisini, at oman fyri nevnda "økismenning" ikki er grundað á vágafúsan kapital, náttúrugivið tilfeingi og aðrar vinnuligar fortreytir. Einasta fortreyt fyri hesari menning er landspolitisk vælvild og ein trivaligur landskassi.

Sum støðan er í dag - gott 10 ár eftir seinastu búskaparkreppuna - er fólkatalið í teimum økjum í landinum har einans uml. 20 prosent av lønunum í framleiðlsuvinnuni verða goldnar og skaptar, hækkað munandi, meðan fólkatalið í teimum økjum í landinum, har írestandi uml. 80 prosentini av lønunum í framleiðsluvinnuni verða goldnar og skaptar, er fallið tilsvarandi.

Harafturat síggja vit, at hóast tíðirnar landsbúskaparliga eru betur enn nakrantíð og almennu rakstarútreiðslurnar seinastu 5 - 6 árini eru øktar við uml. 1,2 mia. kr. árliga, eins og uml. 104 almenn arbeiðspláss eru sett á stovn árliga, er arbeiðsloysi í teimum økjunum, har mesta framleiðslan og fiskivinnan er, vaksandi, samstundis sum inntøkurnar í hesum kommunum eru fallandi.

Spurningurin er tí, í hvussu stóran mun fiskivinna og blokkstuðul kunnu bera, at ein alsamt vaksandi partur av arbeiðsmegini umsitur og veitur tænastur til sín sjálvs og til tann alsamt minkandi partin av arbeiðsmegini, sum arbeiðir í fiskivinnu - og framleiðsluvinnuni.

**Samanumtikið**

Ynskja vit veruliga menning og vøkstur, er neyðugt at styrkja tey øki, har høvuðsvinnan er. Tað gera vit ikki við eitt nú fleiri yvirtøkum og harvið enn fleiri dupultfyrisitingum og tilsvarandi øktari umsitingum innan sama ríkisfelagsskap.

Tað er hin vegin neyðugt m.a. at stuðla gransking á fiskivinnuøkinum, seta í verk útbúgvingar- skipanir í fiskivinnuni, í fólkaskúlanum og á miðnámsskúlunum, at styrkja og menna undirvísingina innan høvuðsvinnu okkara og annars tillaga samferðlu og annan flutning eftir vinnuliga tørvinum hjá fiskivinnuni. "Harmonikutúrarnir" eru hugnaligir, men mugu víkja fyri høvuðsvinnuni.

Eisini er neyðugt at flyta fyrisiting og umsiting út í fiskivinnuøkini, soleiðis at arbeiðsmarknaðurin har gerst meira fjølboyttur og inntøkugrundarlagið í hesum økjum hægri og støðugari.

Skulu Føroyar hava ein sjálvberandi búskap í ríkisfelagsskapinum er stundin komin hjá landspolitikarunum at taka ábyrgd av øllum økjum í Føroyum og harvið menna vælferðarsamfelagið Føroyar.

# Heldur tú at familjan í Føroyum hevur tað nóg gott?

**Jónfinn Petersen**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*

Um svarið er nei, so er Miðflokkurin flokkurin sum tú skal seta tín x við 20 jan.

Miðflokkurin vil stríðast fyri at lætta um hjá barnafamiljum.

Sjálvur havi eg 4 børn og nýggj hús, og eg veit at tey eru mong við mær, sum ikki hava nógv eftir at liva fyri, tá ið skattur, húsalán, barnaansing o.a. er goldið.

Tí vilja vit virka fyri at:

- Skattatrýstið minkar niður á eitt rímiligari støði.
- Tað skal altíð loysa seg at arbeiða.
- Peningurin skal fylgja við barninum.
- Opna fyri møguleikanum hjá mammum, sum ynskja tað, at vera heima hjá børnunum, meðan tey eru smá.
- Systkyna avsláttur á dagstovnum og í barnaansing.
- Ein góðan alternativan bústaðar politik.

Hjálp okkum at hjálpa familjuni!

Vel Miðflokkin

# Á sofuni verður einki val vunnið!

**Heðin Mortensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Síðstu dagarnar hevur ógv verið tosað um nýggjastu veljarakanningina, ið gav Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum so stóra framgongd, at teir báðir einsamallir kundu skipað samgongu, um hetta gjørdist úrslitið av valinum.

Av royndum vita vit tó, at ein veljarakanning altíð virkar sløvandi fyri tey, ið fáa framgongd í henni, samstundis sum hon er sum ein vekjaraklokka hjá teimum, ið fáa vánaligt úrslit.

Tí mugu allir sambandsveljarar kring landið vera til reiðar at geva flokkinum sín stuðul týsdagin! Tað ber ikki til at hugsa, at tá veljarakanningin er so góð, er ikki brúk fyri mínum stuðli.

Tvørturímóti hevur Sambandsflokkurin meiri enn nakrantíð brúk fyri fólksins stuðli, um tað skal eydnast at fáa styrkt støðuna á tingi, so farast kann til verka í Tinganesi eftir valið.

Tí skal hetta vera mín inniliga áheitan á allar sambandsveljarar um at fara á val og stuðla Sambandsflokkinum, tí tað er einasta gongda leiðin, skulu vit aftur fáa sett einstaka borgaran og tørv fólksins í miðdepilin!

Á sofuni verður einki val vunnið, men um vit øll gera okkara part, skal tað nokk bera til at vinna landsins leiðslu aftur, so vit av nýggjum kunnu trúgva á bjartari tíðir fyri land og fólk!





# Hvør hevur hevur feilin – skipanin ella politikararnir?

**Edmund Joensen**
*løgtinsgmaður, og valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Stýrisskipanin er ikki nóg greið. Hvussu ofta hava vit ikki hoyrt hetta frá landsins hægstu monnum. Vit hava sæð landstýrismenn rúka sum flugur fyri lítið og lætt, meðan landstýrismenn, sum hava framt verulig brot, sluppu at sita. Skipanin sigst hava feilin, ikki nóg greið til landsins hægstu at skilja. Lívsins lærdómur hevur svarað hesum sama í hundraðir av árum við hesum orðum. Ongin skipan er betur enn fólkini sum umsita hana gera hana til.

Tá nýggja almenna umsitingin var fult útbygd kostaði hon eftir umleggingina til nýggju stýrisskipanina 52 milliónir kr. um árið. Nú fullveldislandsstýrið hevur sløk 6 ár á baki kostar hon slakar 150 milliónir kr um árið. Skipanin sigst hava feilin. Ikki nóg greið til landsins hægstu menn at skilja.

Fullveldismenn geva einum donskum embætismanni alla skylduna. Tjóðveldismenn kalla nýggju skipanina fyri Finn Normann doktrinina. Finn Norman og hansara skipan fær skylduna fyri at umsitingin er bølgna upp og er trífaldað í prísi um árið síðan fullveldis-landsstýrið tók við.

Skipanin varð gjørd til 5 aðalstýrir og 1 løgmansstýrið, hetta var gjørt við umhugsni og eftir avtalu við flokkarnar í landsstýrinum. Kravið var at vit fingu eina ministerialskipan í staðin fyri gomlu skipanina. Nýggja umsitingin virkaði óføra væl og hevur ikki virkað betur síðan Jóhann Djurhusa tíð. Tað var sanniliga munur á nýggju nýmótans umsinginini hvat samfelagsáhugamálum viðvíkir - innlit, opinleiki og eitt spennandi arbeiðspláss fyri starvsfólkini gjørdist tað eisini.

Umsitingin fekk tey tvey árini undan stjórnarskiftinum í 1998 víst hvør dugur var í henni. - Fíggjarlógar-viðgerðin, minni enn 12 miljónir kr. í eykafíggjarlóg fyri alt árið 1997. - Tað vísti seg týðuliga aftaná kreppuna og undir bankamálinum, hvussu væl landsstýrið var fyrireikað. - Fiskidagaskipanin varð sett í verk og varð nýskapanin eitt satt gjøgnumbrot. - Avmonopoliseringin av tryggingarvirkseminum og teleøkinum var somuleiðis eitt søguligt frambrot. - Stovnanin av Vinnumálastýrinum vísti nýhugsan og var eisini ætlað at fevna um oljumál seinni. - Umleggingin av øllum lógarverkinum.o.s.fr. o.s.fr.

Ein vælvirkandi rímuliga bílig umsiting prógvaði sín dugnaskap. Føroyingar høvdu fingið nýmótans amboð við nýggju skipanini, sum tað sømdi seg, bæði á Løgtingi og í landsstýri.

Tá íð fullveldislandstýrið tók yvir í 1998 kom tað til skorin klæðir. Við tí stýrinum fingu vit tíverri ein nýggjan og ábyrgdarleysan politikk inn í umsitingina. Ì staðin fyri sum ætla 6 landstýrismenn, hækkaði talið til 8 seinni til 9. Flestu munnu minnast, hvussu Anfinn Kalsberg og Fólkaflokkurin keyptu Sjálvstýrisflokkin fyri 2 málsøkir í landstýrinum, Oljumál og Allmanna- og Heilsumál. Ein tann minsti flokkur á tingi við tveimum eykavaldum tingmonnum skuldi umsita um helvtina av allari fíggjarlógini. Slíkt hevði verið fulkomuliga óhugsandi í grannalondum okkara. Hvat hevur tað ikki kosta føroyska samfelagnum hesi árini ?

Sambandsflokkinum fer sjálvandi at bøta um umsitingina aftur. 5 aðalstýrir og ein løgmansumsiting verður útgangstøðið. Eitt er vist Føroyar skulu hava eina vælvirkandi og sterka umsiting.

Vit í Sambandsflokkinum fara at viðgera starvsfólkið í umsitingini rættvíst og virðiliga. Annað kemur sjálvandi ikki uppá tal. Vit fara ikki at siga fólk upp í óðum verkum, um nakar heldur tað. Men vit fara at skera til, so sum mest fæst burturúr. Vit fara eisini at leggja um, so ein partur við tíðini far møguleikar at flyta til málrættaða undirvísing og gransking. Hesin tátturin er tað sum er sjálvt grundalagið undur framtíðarsamfelagnum í framkomnu vælferðarsamfeløgunum.

Ungdómurin skal vita hvar hann hevur Sambandsflokkin Hann skal vita, at Sambandsflokkurin meinar at undirvísing og gransking er sjálvur grundvøllurin undir framtíðar samfelagnum.

Hesin parturin er so dyggiliga afturútsigldur av fullveldismonnum og skal tí ræðfestast á ein heilt annan hátt í framtíðini.

# »Er det skjult kamera...?«

**Vilmund Jacobsen**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Eysturoy*



Okkara samfelag er ikki rættvíst og tekur sær í ov lítlan mun av teimum, sum á ymiskan hátt eru rakt.

Situr tú ryggbrotin eftir vanlukku, ert lamdur av sjúku, skilnaði ella øðrum, kann leitanin eftir einum sømiligum gerandisdegi gerast ein oyðimarkargongd.

Vit hava almennar stovnar, ið hava til endamáls at hjálpa fólki aftur á føtur, men áðrenn tú hevur fótað tær, langar ein annar almennur stovnur til - og fólk eru prísgivin. Í almennu skipanini verða fólk nærmast viðfarin sum djór. Tú rennur teg ímóti allastaðni, og líkt er til, at stovnar hava sum mál at plága lívið úr fólki.

Er sálin sterk og krevur rættvísi, hórar tú kanska undan. Ert tú hinvegin ein av teimum, ið ikki orkar ágangin, liggur tú skjótt við tunguni úti.

Tey, ið líða mest undir slíkum umstøðum, eru neyðars børnini, sum náttúrliga ikki skilja, hví foreldrini eru so tyngd.

Kenni eina føroyska kvinnu, sum kom heim av flatlondum við trimum børnum - øll í skúlaaldri. Maðurin hevði blakað hana á dyr. Hon stóð í Føroyum við ongum bústaði, ongum arbeiði og ongum pengum. Tá ið hon fór til almennan stovn at kæra sína neyð, spurdi ein danskur viðgeri hana - ikki minni enn tvær ferðir: "Er det skjult kamera...?"

Í fyrstu valsendingini í SvF, segði eitt av starvsfólkunum á Almannastovuni, at politikarar í ov lítlan mun vita, hvat gongur fyri seg "á gólvinum" - og tá sipaði hesin til gólvið á Almannastovuni.

Men tað er eitt gólv niðan fyri gólvið á Almannastovuni, har tey kreppuraktu, sjúku og lamnu stríðast.

Vita politikarar ikki, hvat gongur fyri seg á "gólvinum" á almennu stovnunum, vita teir enn minni, hvat gongur fyri seg niðri á tí veruliga gólvinum.

Umráðandi er á valinum, 20. januar, at velja fólk á ting, sum hava lívsroyndir og lívsvísdóm - og ikki "sveimað" omanfyri teimum, sum stríðast í skipslastini, við bryggjukantin, á flakavirkisgólvinum, við vegjaðaran ella taka sær av teimum sjúku og gomlu.

Tað eru persónarnir, sum mynda flokkarnar. Tjóðveldisflokkurin vil betra um korini hjá teimum, sum av eini og hvørji orsøk eri skerd í samfelagnum. Flokkurin er trygdin fyri, at hildið verður fram á ábyrgdarleiðini til einar betri Føroyar.

Tú og E kunnu tryggja, at tykkara sjónarmið verða borin fram á tingi.

Eg bjóði meg fram at verða verji hjá tykkum!

# Downs syndrom »Mongolisma«

**Thomas J. Askham**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Í tíðindaflutninginum í vikuni, bórust tíðindi úr Danmark, at kvinnur skuldu fáa tilboð um fosturvatnsprøva, fyri at kanna eftir at fostrið hevði Down syndrom, mongolismu.

Eg má spyrja hvat vil tey vilja við slíkum.

Er hetta tað fyrsta stiðið til at við tí læknatøknið sum er í dag at vit við hesum tilboði vilja og ynskja at skapa tað "reina og perfekta" samfelagið, har tað ikki verður pláss fyri teimum, sum høvdu eitthvørt brek, sum ikki hóðaði tí "perfekta samfelagnum".

Í mínum hugaheimi er hetta reindyrka egoisma á høgum støði.

Eg minnist tað orðaskiftið, sum fór fram í donskum miðlum, har tað bleiv tosa um hvussu nógv børn við Downs syndrom kostaði tí danska heilsuverkinum.

Fyri mær er hetta ein ræðandi tanki at vit grípa so langt inn í tað persónliga frælsið hjá kvinnuni og manni hennara.

Eg eri onga løtu í iva um, at um tað av læknanum verður staðfest at fostrið hevur Downs syndrom, so verða mamman og pápin sett yvirfyri einum vali um hvat víðari skal henda.

Hetta fykir mær at verða ein órímilig støða at seta hesi foreldur í. Foreldrini gleða seg til hetta barnið, so hví skulu vit við hesum fosturvatnsroynd, útseta foreldrini fyri stúran og ótta um tað úrslit sum fyriliggur.

Nú veit eg val at tað eru mong, sum føra fram at hetta er ikki aktuelt her í Føroyum.

Tað er bara ein sannroynd at tað plagar ikki at ganga long tíð, so byrja røddir at hoyrast her á landið um vit ikki áttu at tikið hetta til okkum eisini.

Mær tykir at vit menniskju við tí tøkni, sum vit ráða yvir í dag, er á veg út á ein glíðubana. Hvat verður tað næsta vit skulu kanna. Møguliga ein ekstremur tanki. Hevur fostrið nú tann rætta hárlitin? Tann rætta egnalitin?

Eg eri púra sannførdur um, at tað ganga ikki mong ár, so skulu okkara politikarar finna eitthvørt lógarsmíð, sum hóskar til okkara viðurskiftir.

Miðflokkurin vil altíð hava eitt vakið eyga hvat kemur at henda á hesum øki.

Vit heita staðiliga á tykkum, sum vilja standa saman við okkum um at fara á val tann. 20 jan. Og seta ein sterkan Miðflokk inn á ting. Setið X við lista H, ella við eitt av valevnum floksins.

# Er alt bert svart hvítt?

**Terji Rasmussen**
*Valevni sjálvstýrisfloksins í suðurstreymi*



Hvussu ber tað til, at prátið hjá politikkarum altíð snýr seg um antin ella.

Tá evnið verða viðgjørd er svarið oftast, ja ella nei. Hví verður ikki heldur tosa um nuansurnar í málunum. Tað verður seg, tá tosa verður um samband - loysing, frí fosturtøka kontra eingin fosturtøk, stuðul ella ikki stuðul o.s.fr. o.s.fr.

Einki her í lívinum er bara svart ella hvítt, tá avgerðir skulu takast á politiska víðvøllinum.

Sjálvstýrisflokkurin er garantur fyri komprimissum og nuansum í øllum málum.

Um tú ikki ynskir at ekstrimistar eina, skulu ráða í hesum landið, eigur tú at velja sjálvstýrisflokkin.

Hvør kann? D kann!